# Rutukoyring eftir Oyggjarvegnum



*Myndin er tikin umleið 1965 við Hórisgøtu, við vegendan norðanfyri. Rutubilar eru báðumegin og fólk ganga millum vegirnar. Tað hevur ikki altíð verið so tespiligt hjá ferðafólki at ganga millum vegirnar uppi í fjøllunum á vetri. Á myndini eru tríggir Mercedes-Benz bussar, ein Ford Taunus hýruvognur og ein Ford Taunus Transit bussur fullur av ferðafólki og viðføri á takinum*

*Mynd: Dánjal Poulsen*

**Hóast vegur varð gjørdur úr Havn og úr Kollfjarðadali í 1963, vórðu hesir vegir ikki samanbundnir við Hórisgøtu fyrr enn í 1966. Í trý ár máttu ferðafólk ganga millum rutubilarnar uppi í fjøllunum í øllum veðri**



## Føroyar mítt land



**Magnus Gunnarsson**
maggi@sosialurin.fo

Arbeiðið við at gera Oyggjarvegin úr Havn niðan í Mjørkadal og víðari niðan á Sornfelli varð gjørt frá 1959 til 1961. Tað at Oyggjarvegurin nú var komin so langt norður, varð byrjanin til eitt nýtt ferðasamband millum Streymoy, Vágar og Norðureysturoy.

Vegurin niðan á Sornfelli gekk nakað norður um Mjørkadal, áðrenn niðankoyringin til fjallið byrjaði. Nærmasta bygd var Signabø. Hetta hevði við sær at ferðafólk so smátt fóru at nýta hesa nýggju farleiðina og gingu millum endan á Oyggjarvegnum og Signabø eftir Hórisgøtu.

Koyrandi hevur verið ímillum Kollafjørð og Kvívík síðan einaferð í 20-unum, og vegurin millum Kvívík og Vestmanna kom ígjøgnum í 1944.

Rutukoyring var í sambandi við at bátarnir hjá Mjólkaforsýningini sigldu inn á Kollafjørð á veg gjøgnum Sundalagið. Soleiðis varð ferðast til og frá Havnini.

Ferðafólk, ið skuldu til Havnar, kundu nú ístaðin fyri at fara við rutubátunum úr Kollafirði verða koyrd til Signabø og síðan ganga niðan eftir Hórisgøtu, til ein hýruvogn, ið tey høvdu býlagt úr Havn. Hóast tað var nakað langt og tungt at ganga, var tað skjótari enn at fara við rutubátinum, sum ofta hevði nógva frakt við og skuldi víðari til aðrar bygdir í Sundalagnum.

Hetta var byrjanin til regluligu rutukoyringina eftir Oyggjarvegnum, sum bilstøðirnar í Havn og bilførararnir norðan fyri skipaðu fyri.

Arbeiðið við Oyggjavegnum helt fram, og í 1963 var vegurin úr Kollfjarðadali og niðan til vegin sum gekk niðan á Sornfelli við Skeiðsá liðugur.

Men avgjørt var ikki at ikki at binda vegin úr Kollfjarðadali og vegin úr Havn saman, helst av tí at roknað hevur verið við ov nógvari ferðslu eftir Oyggjarvegnum, meðan arbeitt varð við at breiðka og gera vegin lidnan og kláran at taka ímóti ferðsluni.

Hetta hevði við sær at rutubilarnir úr Havn og teir frá bygdunum norðan fyri settu ferðafólkini av hvør síni meðin Skeiðsá, so gingu tey eftir eini